# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Vinnarin av European Business Game:

# Bjarging í ullintum klæðum

**Næmingar á Tekniska Skúla í Klaksvík vunnu skúlakapping við hugskoti, ið bæði lyftir gamlan, føroyskan arv og gongur nýggjar leiðir**

KAPPING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Varðskúlastjórin á Tekniska Skúla í Klaksvík, Eyðgunn Samuelsen, handar næmingunum heiðursbræv*



*Ullint undirklæðir ella bjargingardrakt? Tekniski leiðarin í fiktivu fyritøkuni vísir vøruna fram*

Føroyska endakappingin í European Business Game var í Norðurlandahúsinum fríggjadagin í síðstu viku. Føroyski vinnarin, sum skal til Skotlands at kappast í europeisku endakappingini í juni, var bólkurin Quality Marine Woolwear frá Tekniska Skúla í Klaksvík.

Vinnarabólkurin er mannaður av Kenneth Jørgensen úr Fuglafirði, Kristian Eysturoy av Argjum, og Mannbjørn Anthoniussen, Sjúrða Jacobsen, og Mariu Brim Joensen úr Klaksvík. Hugskotið, sum vann, var at framleiða undirklæði úr føroyskari ull til at brúka umborð á bjargingarbátum.

Mánadagin var móttøka á Tekniska Skúla, har vinnarnir fingu heiðursbræv handað frá varaskúlastjóranum, Eyðgunn Samuelsen, og næmingar og lærarar á skúlanum og onnur áhugaði fingu høvi at hoyra nærri um verkætlanina.

Ungu fólkini í Quality Marine Woolwear siga, at tey hava lært ómetaliga nógv av at vera við í hesari kapping. Hetta er ikki sum vanligu tímarnir, har lærarin undirvísir, og næmingarnir lurta.

Tey hava sjálvi gjørt stutttíðar og langtíðar virkisætlanir fyri fiktivu fyritøkuna. Tey hava funnið samstarvsfeløg, tilrættalagt framleiðsluna, kannað marknaðin og orða eina ætlan fyri marknaðarføringina. Lærarnir hava vegleitt, men arbeiðið hava tey sjálvi gjørt.

Bjarni Djurholm, landstýrismaður í vinnumálum, legði í síni setunarrøðu í Norðurlandahúsinum herðslu á, hvussu stóran týdning tað hevur, at íverksetarahugburðurin verður mentur og styrktur í føroyska samfelagnum. Og her eiga skúlarnir ein týdningarmiklan leiklut.

## Hugskot úr Sandoynni

Verkætlanin, Quality Marine Woolwear, er eitt virki, ið framleiðir eina bundna og tøvda drakt úr reinari føroyskari ull. Ætlanin er, at draktin skal liggja vakumpakkað í øllum bjargingarbátum. Í dag eru bjargingarbátar útgjørdir við teppum, men Quality Marine Woolwear heldur, at ullint undirklæði eisini áttu at hoyrt til standardútgerðina.

Hugskotið stavar upprunaliga úr Sandoynni. Bólkurin skrivar í síni verkætlan, at Súsanna í Jákupstovu av Sandi fyri fleiri árum síðani sendi eina áheitan til landstýrið um, at tað skuldi vera eitt krav, at føroyskir bjargingarbátar vóru útgjørdir við undirklæðum úr føroyskari ull.

Sandoyarkonan hoyrdi ongantíð nakað aftur um hugskotið. Men umvegis nýggja spunavirkið í Klaksvík náddi uppskotið næmingarnir á Tekniska Skúla, og nú er ein verkætlan gjørd, sum í juni skal royna seg í altjóða kapping við onnur góð hugskot. Ullintu bjargingarklæðini eru bæði nýskapandi og siðbundin. Bólkurin hevur kannað marknaðin og funnið út av, at ongin higartil hevur framleitt ullint klæði til bjargingarbátar.

Men ullint undirklæðir eru sjálvandi ikki ókend fyri føroyskar sjómenn. Sum ein av næmingunum, Maria Brim Jacobsen, sigur:

- Føroyska søgan vísir, at ullint undirklæðir bjarga lív. Nógvir føroyingar hava yvirliva á sjónum, tí teir vóru í klæðum úr feittutari føroyskari ull.

Eisini í verki er ætlanin eitt samstarv millum ungt og gamalt. Ungu næmingarnir hava fyrireika vinnuliga partin, meðan tey hava fingið onnur at standa fyri sjálvari framleiðsluni. Klæðini eru til dømis bundin av eldri klaksvíkskonu á grovbindara hjá Monu Olsen, sum í mong ár spann og bant ullint klæðir til føroyskar sjómenn.



*Maria Klein frá spunavirkinum Filana hevur bundið bjargingardraktina á gomlu bindimaskinuni hjá Monu Olsen*



*Vinnarnir av føroysku undankappingini til European Business Game, Kenneth Jørgensen, Kristian Eysturoy, Sjúrður Jacobsen, Maria Brim Joensen og Mannbjørn Antoniussen*

## FAKTA

**Brot úr verkætlanini, Quality Marine Woolwear:**

Gamla orðatakið »Ull er Føroya Gull« sigur okkum, hvussu føroyingar hava virðismett ullina. Sjómennirnir plagdu enntá at gera hosurnar vátar, áðrenn teir fóru til útróðrar, fyri betur at halda hitanum. Eisini eru nógvar søgur um sjómenn, ið hava ligið á havinum, sum hava bjargað sær lívinum, tí teir hava verið í føroyskum undirklæðum.